FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tinganes, 18. november 2019

J.Nr.: 19/00424-2

Svar upp á fyrispurning nr. 17/2019 eftir § 52a í tingskipanini frá Djóna Nolsøe Joensen, løgtingsmanni, um skattafrádrátt fyri virðiskort fyri ítróttar, mentanar- og frítíðarvirksemi

Spurningur:
Ætlar landsstýrismaðurin at broyta ásetingarnar í skattalógini, so virðiskort fyri ítróttar-, mentanar- og frítíðarvirksemi verða javnsett við onnur undantøk so sum hækkaðan barnafrádrátt, lækkað ansingargjøld og annað?

Svar:
Hetta er eitt nýtt átak, sum einstakar kommunur hava tikið stig til.

Talan er um eitt virðiskort, sum er oyramerkt børnum, og sambært § 5 í skattalógini verða børn sjálvstøðugt sett í skatt av inntøku síni. Tað einasta undantakið í so máta er inntøka, sum heimabúgvandi børn undir 16 ár vinna í vinnuvirki foreldranna, og tað er tað ikki talan um í hesum føri.

Men hóast børn eru sjálvstøðugt skattskyldug av inntøku síni, so hava tey allarfægstu inntøku, sum er omanfyri botnfrádráttin; so virðiskortið verður fyri tey flestu skattafrítt uttan lógarbroyting.

Um hvørt einstakt barn skal geva upp á hvørjum ári, verður tað ein tung skipan fyri foreldur og fyri TAKS ein umsiting, sum kemur at kosta.

Til tess at gera umsitingina við virðiskortum lættari at umsita, er landsstýrismaðurin í fer við at kanna, um og hvussu ein kann fáa eina skipan í lag, har kommunur við virðiskortum vegna sínar íbúgvar árliga boða TAKS frá við navn og p-tali, hvør í kommununi hevur fingið eitt virðiskort, og hvør upphædd er latin viðkomandi. Tað hevði lætt um hjá TAKS og foreldur nýttust ikki at hugsa um skylduna at boða TAKS frá.

Fíggjarmálaráðið, 11. november 2019

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður